# Bretskir fjølmiðlar vitja í Føroyum



*Bretskt fjølmiðlafólk vitja í hesum døgum í Føroyum.*

**Hesar seinastu dagarnar hava bretsk fjølmiðlafólk vitja í Føroyum. Hesi eru boðin til Føroya av føroysku ferðavinnuni, og eftir ætlan skulu tey síðani skrivað um Føroyar í teirra heimlandi**

FERÐAVINNA
*Heri á Rógvi*

Hóast summarið er byrjað at halla, so stevna ferðafólk framvegis til Føroya. Millum hesi ferðafólk er hesar dagar eisini ein bólkur ein bólkur av fjølmiðlafólkum, sum eru komin til Føroya í arbeiðsørindum.

Talan er um ein bólk av fjølmiðlafólkum, sum umboða ymisk bretsk bløð. Millum umboðaðu bløðini á hesari vitjanini teljast so stór bløð sum »The Mirror« og »Evening Standard«. Eisini er eitt umboð fyri blaðið Metro við á túrinum. Metro er eitt rættiliga kent blað, sum fæst ókeypis á flestu undirgrundarjarnbreytarstøðunum í London og aðrastaðni eisini. Eisini er ein sokallaður freelance journalistur við á ferðini.

Skráin hjá teimum fevnir rættiliga víða. Tey hava verið ymsastaðni í Føroyum. Síðani tey komu, mikudagin, hava tey verið í Vestmanna, við Gjógv, ì Havn og í Vágunum. Ferðalagið fer av landinum seinnapartin í dag.

### Herferð

Tað er Ferðaráð Føroya, sum saman við Smyril og Atlantic Airways hevur skipað fyri vitjanini. Vitjanin er í sambandi við eina herferð í Onglandi, sum hevur til endamáls at fáa fleiri bretsk ferðandi til Føroya. Herferðin fór av bakkastokki í vár. Hetta er serliga gjørt í sambandi við, at Atlantsflog nú er farið undir regluliga rutu til London.

Tað, at útlendsk fjølmiðlafólk vitja, er ikki nakað sjálvsamt í Føroyum. Av Ferðaráðnum verður upplýst, at tey gera vanligt ein pressutúr um árið, men tað javnan eisini koma fjølmiðlafólk av sínum eintingum til Føroya.

Hóast tað eru Atlantsflog og Smyril Line, sum skipa fyri, so merkir hetta ikki, at fjølmiðlafólkini bert hjá hesum báðum. Farið verður, sum áður nevnt, ymsastaðni runt í Føroyum við teimum.

Tá Sosialurin fangaði tey, vóru tey á veg út í Tinganes ein túr, men eftir ætlan stóð eingin politikari á skránni. Eisini hevur onkur teirra hugt at fótbólti í Føroyum, soleiðis at eisini aðrir partar av føroysku mentanini fáa eitt sindur av umtala.

### Umtala

Vitjanin hjá fjølmiðlafólkunum í Føroyum er partur av hesari góðu herferð. Spurningurin er so bara, hvat fær tann føroyska ferðavinnan burturúr?

Av Ferðaráðnum verður upplýst, at tey fyrst og fremst hava tryggja sær umtalu við at bjóða fjølmiðlafólkunum henda vegin. Fleiri av bløðunum havi bundið seg til at skriva eitt sindur um Føroyar, men í hvussu stóran hetta verður gjørt er so upp til tann einstaka blaðið.

Ferðaráðið metir eisini hetta sum ein kærkomnan og ikki alt ov kostnaðarmiklan møguleika fyri at marknaðarføra Føroyar.

Á Ferðaráðnum hava tey upplivað, at fólk hava vent sær til teirra, eftir at tey hava sæð eina grein í onkrum blaði. Áhugin millum fjølmiðlafólk er eisin stórur í ár. Størsta ávirkan verður tó mestir óbeinleiðis, tá fólk síggja greinir um Føroya, so økir hetta óivað um teirra hug at ferðast til oyggjarnar í Norðuratlantshavi.

# Hin føroyski Don Juan

**Leikbólkurin Usenkev hevur hesar næstu dagarnar fleiri framførslur í Føroyum. Hetta er ikki júst tað slagið av sjónleiki, sum føroyingar eru vanir við. Leikararnir siga seg ikki vera komnir nærri at einum svarið uppá, hvør Don Juan er**

listastevna føroya 2001

SJÓNLEIKUR
*Heri á Rógvi*



*Tey trý f.v. Gunnvá, Nicholas og Christine manna saman við Maritu Dalsgaard Usenkev*

Fyrst í sjeytiárunum lat William Heinesen stuttsøguna »Don Juan fra Tranhuset« úr hondum. Hesa somu stuttsøgu hevur leikbólkurin Usenkev valt at gera til leik og framføra. Hesin leikur er rættiliga sermerktur á nógvum økjum. Sjónleikur snýr seg m.a. um ást, øvund, hitt fremmanda og ikki minst girndin. Sjónleikir av hesum slag eru rættiliga óvanligir í Føroyum, og hetta eru leikararnir eisini fult greiðir yvir.

Leikurin fer fram í 1893 í Havn. Tað er ein skipsbrotin maltesi, sum verður funnin av mammu og dóttir, og hesar bera beinanvegin tokka til henda góða fremmanda mann. Síðani kemur maðurin fyri seg aftur, og tað gongur ikki rúm tíð áðrenn flest allar kvinnur hava fingið eitt gott eyga á henda mann, og allar kvinnurnar droyma um henda góða mann. Henda er fyri so vítt kjarnin í søguni, men sjálvandi liggur meira í hesum leiki, enn bert eitt spæl við hinari sterku girndini.

Bólkurin Usenkev hevur áður verið í Føroyum við einum øðrum leiki. »Don Juan fra Tranhuset« er eisini framførdur í Danmark, og ummælini vóru eisini sera góð, og hetta fegnast leikararnir sum vera man eisini um.

– Hetta er ein so sermerktur leikur, at vit vistu ikki, hvussu hann fór at vera móttikin, sigur Gunnvá Zachariasen.

Gunnvá er sjálv ein av trimum sjónleikarum í Usenkev. Hinar báðar eru Marita Dalsgaard og Christine Albeck, sum báðar hava gingið sjónleikaraskúla í Odense. Eisini er tónleikarin Nicholas Kingo (jú teir eru í familju) við. Hann skal byrja á triðja árið á Konservatoriuminum. Gunnvá er eisini útbúgvin sjónleikari, so tað eru nøkur væl útbúgvin fólk, sum spæla fyri føroyingum í løtuni.

### Girndin

Tað slepst ikki undan at nevna, at hesin sera erotiski og sterki sjónleikurin er nakað, sum vit í Føroyum ikki síggja so nógv til. Leikurin »Eitur nakað land weekend« var eisini av mongum mettur at vera sera sterkur og grovur, og tað vóru eisini fleiri, sum hildu uppá, at talan var um nýbrotið innan føroyska leiklist.

Sjálvi siga tey seg ikki hugsa so nógv um, at leikurin vísir eitt sindur av »kjøti og blóði«, sum tey taka til.

– Tað er greitt, at hetta ikki er gerandiskostur í Føroyum, men hetta er nú einaferð soleiðis at leikurin er háttaður. Vit vistu ikki, hvussu fólk fóru at reagera, men vit hava fingið góðar reaktiónir higartil, siga tey.

Hóast tann kanska meira erotiski parturin er sterkur í leikinum, so er hetta kanska meira hamurin, tí tað liggur eisini nógv meira í tí.

Sjónleikurin er eisini ein samfelagslig lýsing, og sigur okkum eisini eitt sindur um, hvussu menniskju onkuntíð uppføra seg.

### Føroyskt og danskt

William Heinesen skrivaði allar sínar søgur á donskum, men leikararnir í Usenkev halda tó, at tað ikki er vanligt danskt.

– Eg havi eisini verið noydd til at seta meg væl inn í tann málsliga partin, tí William Heinesen hevur sítt egið mál, sigur Christine Albeck.

Sjónleikurin verður spældur á donskum, og verður hetta gjørt fyri at varðveita tað upprunarliga. Tey siga, at tað er ymiskt, hvussu danskir og føroyskir áskoðarar uppliva leikin, tí okkurt í leikinum skilja kanska bara føroyingar, men so er málið kanska ein trupulleikin, siga tey.

Tá tey verða spurd, um tey nú vita, hvør Don Juan er, so siga tey seg vera longri frá svarinum enn nakrantíð. Tað er kanska ikki heilt óhugsandi, at onkur fer at finna ein føroyskan Don Juan, tá tey fara at hyggja eftir leikinum.

Leikurin verður spældur í Suðuroy fríggjakvøldið. Sunnudagin verður tað sandoyingar, sum fáa høvi at síggja leikin. Í komandi viku verður leikurin spældur í Sjónleikarhúsinum í Havn.



Nr. 153 • leygardagur • 11. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir hetta vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 11.08 | KÍ-VB | Oddmar Andreasen |
| 11.08 | B68-NSÍ | Páll Augustinussen |
| 11.08 | FSV-B71 | Lassin Isaksen |
| 11.08 | B36-EB/Str. | Dagfinn Olsen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 12.08 | Skála-HB | Hans F. Hansen |
| 12.08 | NSÍ-LÍF | Petur Hans Joensen |
| 12.08 | ÍF-Sumba | Petur Reinert |
| 12.08 | GÍ-KÍ | Jonhard Hansen |
| 12.08 | B36-TB | Eiler Rasmussen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 11.08 | GÍ-AB | Jógvan A. Jacobsen |
| 11.08 | KÍ-VB | Johnleif Gerðisá |
| 11.08 | B68-Royn | Edvard Højgaard |
| 11.08 | ÍF-B71 | Palli Gregersen |
| 11.08 | B36-TB | Hans Eivind Olsen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 12.08 | HB-KÍ | Jóhann Krogh |
| 12.08 | B68-B36 | Dia Lamhauge |

FK Obilic.GÍ 4-0 (2-0):

# GÍ blotnaði í sólini



*Sámal Joensen og Henning Jarnskor fáa bert hugt at, meðan Simonovic smekkar til, og fyrsta málið hjá Obilic er veruleiki*
*Mynd: Aleksander Djorovic*

**Nógvu hitastigini í Beograd gjørdu helst sítt til, at gøtumenn lítið og einki fingu gjørt við sterka FK Obilic**

UEFA-CUP
*Jákup Mørk*

GÍ leikti hóskvøldið fyrra dystin móti Jugoslaviska Obilic, og sum væntað, kundi føroyska oddaliðið ikki gera stórvegis fortreð móti jugoslaviska yvirvaldinum.

Longu tá lutakastið fór fram, roknaðu flest øll við, at GÍ hevði fingið óhepnastu dragingina av føroysku liðunum, og eftir dystin í Beograd man henda meting eisini standa við.

### Lág leikferð

Úrslitið gjørdist eitt 0-4 tap, og sum skilst á lagnum, so var ógvusligi hitin ein av orsøkunum til, at tað gjørdist so torført hjá føroysku leikarunum. Um 36 hitastig vóru í Beograd hósdagin – í skugganum – og hetta er so als ikki nakað, sum hóvar okkara leikarum serliga væl. Sjálvt miðlar á staðnum skýrdu umstøðurnar fyri ekstremar, og sagt verður, at hetta eisini gjørdi sítt til, at ferðin á spælinum ongan tíð gjørdist tann heilt stóra.

Obilic legði seg á odda, tá 23 minuttir, og var tað Simonovic, sum við einum góðum skoti syrgdi fyri hesum. Undan hesum hevði sami leikarin havt eitt skot á stongina.

Gøtumenn høvdu at kalla ongar møguleikar at skjóta seg inn aftur í dystin, og beint fyri hálvleik mundu juguslavarnir økt um leiðsluna, men enn eina ferð bjargaði stongin gøtumonnum. Lítla løtu seinni var tó einki at gera, tá Zoric frá 11-metra blettinum sendi brotsspark í kassan.

### Tvey afturat

Í seinna hálvleiki helt gongdin fram. Obilic hevði tamarhald á so at siga øllum, men tað eydnaðist teimum tó ikki at skjóta meira enn tvey mál afturat.

Hitt fyrra kom, tá Mladenovic stutt eftir steðgin gjørdist leysur við Halli Hansen. Í fyrstu atløgu bjargaði Hallur, men jugoslavin var eisini fyrstur á returinum.

Seinastu 25 minuttirnar spældu jugoslavarnir við 10 monnum, tá Mladenovic varð rikin av vøllinum, men teir hildu framvegis fast um yvirvágna, og stutt eftir útvísinginar skeyt Filipovic seinasta málið í dystinum.

### Eingin møguleiki

Við tapinum er so einki at ivast í, at leiluturin hjá GÍ í Europa í ár er av. Hetta nýtist tó als ikki at vera nakar bági í so máta. Í landskappingini hava teir nóg mikið at síggja til, og nú tykist ikki serliga sannlíkt, at returdysturin móti Jugoslavum fer at órógva nakað serligt í høvdinum, tá teir annað vikuskiftið koma til Havnar, har tað sum líkist eini FM finalu er á skránni móti B36.

### Dysturin í tølum:

**FK Obilic - GÍ 4-0 (2-0)**

1-0: Simonovic, 23
2-0: Zoric, 44 (br.)
3-0: Mladenovic, 49
4-0: Filipovic, 66

B36-EB/Streymur:

# Fer B36 eisini at snáva?

**EB/Streymur hjálpti B36 fyri viku síðani, men nú skulu havnarmenninir sjálvir ansað sær móti samansetta liðnum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

B36 hevur møguleikan at leggja seg á odda í landskappingini fyri fyrstu ferð hetta kappingarárið. Kravið til hetta er ein sigur. Somikið einfaldar eru treytirnar hjá teimum svørt/hvítu, og einki er at ivast í, at teir fyrireika seg væl til hesa uppgávuna.

Venjarin, Piotr Krakowski, hevur so at siga allar sínar mans tøkar til dystin. Kenneth Jacobsen fekk skaða á Sandi, og verður helst ikki við, og Fróði Clementsen hevur ligið sjúkur alla vikuna. Teir báðir eru tó sjáldan byrjaðir millum teir fyrstu ellivu, so í byrjunaruppstillingini tykjast B36'arnir at vera eins væl fyri, sum teir vóru seinast.

### Eingin lættur dystur

EB/Streymur hevur sum so heldur ikki teir nógvu skaðarnir at dragast við. Christian Carlsson fekk ein løst undir venjing hóskvøldið, men seinast vit frættu, var hann so einasta ivamálið.

Málið hjá teimum verður sjálvsagt at leggja enn einum oddaliðið forðingar fyri, men spurningurin er so, hvussu fer at hilnast hesaferð. B36 hevur so ikki somu trupulleikar av mannfalli, sum GÍ hevði fyri viku síðani, og so eru teir í B36 nú eisini ávaraðir um, at talan als ikki er um nakran sonevndan »walkover«, tá uppflytararnir eru á vitjan.

*B36 hevur møguleikan at koma heilt fram í oddin, tá teir leygardagin spæla móti uppflytarunum úr EB/Streymi*

